# Langur leygar-dagur í miðbýnum

**Leygardagin 24. juli verður eitt spennandi tiltak í miðbýnum í Havn. Talan er um eitt samstarv ímillum Havnar Fimleikarafelag og Kunningarstovuna. Nógv ymiskt verður á skránni, m.a. verður stór mótaframsýning, tombola og Angela og Hannibal undirhalda eisini.**

LANGUR LEYGARDAGUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Angela og Hannibal fara at undirhalda í miðbýnum leygardagin 24. juli, táið Havnar Fimleikarafelag skipar fyri ymsum tiltøkum.*
*Mynd: Savnsmyndir*



*Nógv stuttligt verður til børnini, m.a. hevur Havnar Fimleikarafelag leigað eina hoppiborg og eina karusell, sum møguleiki verður at royna frá kl 10 á morgni og til økið steingir seint seinnapartin*
*Mynd: Savnsmyndir*

Annie Kyster er samskipari av tiltakinum, og hon sigur, at hetta kom rættiliga knappliga í lag.

– Eg ringdi oman á Kunningarstovuna, og vildi upprunaliga biðja um at sleppa at hava okkurt tiltak í mei 2005. Eg fekk at vita, at so langt høvdu tey als ikki planlagt enn. Tey søgdu mær so, at eingin hevði biðið um at fáa miðbýin leygardagin 24. juli, sum er síðsta vikuskiftið undan Ólavsøkuni – og langur leygardagur. Tað ljóðaði fantastiskt, so eg smekkaði til og tók av, greiðir Annie frá. Hetta var 2. juni, og síðani hava tey í Havnar Fimleikarafelag havt úr at gera við fyrireikingunum.

## Skráin

Tiltakið byrjar kl 10 um morgunin, tá tey fara at hava fiskibrunn, mat- og bommtombola. Kemur svongd á fólk, verður eingin vandi, tí tey í HF fara eisini at baka vaflur niðri á Vaglinum, og ein pylsuvognur verður eisini á staðnum.

Fyri at gera tað spennandi fyri børnini, hevur Havnar Fimleikarafelag eisini leigað eina barnakarusel og eina hoppiborg frá Jón á Plógv. Møguleiki verður at royna hetta frá kl 10 á morgni og allan dagin á tamb.

Einaferð fyrrapartin um 11-12 tíðina verður høvi at síggja eina fimleikaframsýning við FM-fimleikarum. Annie greiðir frá, at tey hava eina langa luftmáttu, sum verður rullað út til amboðsfimleikararnar at vísa síni kynstur á. Fimleikararnir verða í øllum aldri, frá 8 og til eini 25 ár.

Kl 13.30 verða Angela og Hannibal á Vaglinum við undirhaldi til børnini. Tey verða at síggja í ein hálvan tíma. Kl 14.00 byrjar so stóra mótaframsýningin, sum HF skipar fyri, í samstarvi við Kunningarstovuna. James Olsen verður frásøgumaður og Mark Joensen kemur at hava tónleikin undir hond. Eini 14 miðbýarhandlar verða við og øll, sum skulu ganga modell, vera limir í HF. Modellirnar vera úr 14 árum og upp í +40 ár, so tað skuldi verið nakað fyri øll at sæð. Handlarnir fáa tvær modellir í part. Táið mótasýningin er komin í helvt, verður steðgur, har Angela og Hannibal aftur fara at undirhalda. Síðani heldur mótasýningin fram. Annie greiðir frá, at pallurin fer at ganga út frá býráðssalinum, og modellirnar fara at skifta inni á býráðnum.

Kl. 16 verður enn ein framsýning, hesuferð við ungdómum, sum dansa hiphop/break. Tey fara at dansa í uml 15-20 min. Annie sigur, at tað eru bæði dreingir og gentur við í hesum bókinum, men hon veit ikki, um øll vera við. – Tað er feriutíð, so tað er ikki vist, at øll eru heima. Og so er tað tann ævigi spurningurin, um dreingirnir fara at tora at stilla upp og dansa fyri almenninginum. Tað er jú eitt tabu, at føroyskir dreingir dansa, sigur hon.

Økið letur aftur táið handlarnir lata aftur seint leygardagin.

## Nógv fólk við

Um eitt slíkt tiltak skal kunna lata seg gera, er neyðugt við nógvum sjálvbodnum arbeiði. Men Annie heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki at fáa fólk at hjálpa til. – Tað vísir seg ofta, at fólk eru skjót at hjálpa, tá tað eru uppgávur sum hesar. At baka eina kaku ella standa í einum bási nakrar tímar. Tá er einki problem. Tað er verri táið uppgávurnar verða eitt sindur meiri bindandi, t.d. tá tey verða biðin til nevndararbeiði. Tá er hopleyst at fáa fólk. Men hetta er eitt hugnaligt tiltak, og fólk hava verið óført at bjóða seg fram, sigur Annie.

Eini 1200 limir eru í Havnar Fimleikarafelag, so tað eru nógv fólk knýtt at felagnum. Annie sigur, at størsti parturin av orkuni í felagnum fer til ungdómsarbeiði. – Tey ungu krevja sjálvandi nógv meiri enn tey eldru gera. Tey koma, gera fimleik og fara avstað, meðan tey ungu krevja nógv meiri arbeiði. Tú kanst eisini gera nógv meiri við teimum ungu, tí tey eru altíð við uppá alt beinanvegin. Tað er stuttligt, sigur Annie.

## Endamálið

Annie sigur, at peningurin, sum kemur inn av tiltakinum, er oyramerktur til eitt ávíst endamál.

– Vit hava einki lopgólv í Havn, og tað manglar okkum. Fimleikarsambandið eigur eitt tílíkt gólv, og vit hava gjørt avtalu um at læna tað. Men vit eiga einki høli, har gólvið kann liggja í frið. Gólvið er 12 x12 metrar til støddar, so tað tekur eitt sindur av plássi, og tað kann ikki bara flytast til síðis, um høli skal nýtast til okkurt annað. Tískil hava vit gjørt ein leigusáttmála við Kaj Andreassen, og leigan er ikki bílig. So stórur partur av peninginum fer til leigu av hølum til lopgólvið, staðfestir Annie. –Loypir nakað av peningi av, fer tað til ungdómsarbeiðið.

HF hevur annars eina avtalu við HB og B36, um at fáa eitt høli til lopgólvið í nýggja húsinum, sum fótbólstfeløgini fara at byggja í felag. Tað húsið verður bygt ímillum HB- og B36 húsið við ovara vøll. Men hetta verður ikki fyrr enn um nøkur ár.

– Øllum feløgum tørva pening av og á, og HF er einki undantak í so máta. So vit seta alla orku inn leygardagin 24. juli. Vit eru bara heldig, at eingin longu hevði bílagt sær langa leygardagin í miðbýnum. Nú mugu vit bara vóna, at tiltakið eydnast væl og at veðrið verður gott, so nógv fólk koma sær ein túr oman í býin, sigur Annie Kyster at enda.

KJALLARIN
LIST OG HÚSGØGN
ÁARVEGUR 5 · TÓRSHAVN · TEL 31 37 20

LEYGARDAGIN ÷15% AV ØLLUM SKÓM
TILBOÐ LEYGARDAGIN














Roynið okkara vælumtókta Ólavsøkuborð...

**27. juli kl. 12.00 - 22.00**
Ólavsøkumatskrá við 3 rættum kr. 225,-

**28. juli kl. 12.00 - 22.00**
Stóra **Ólavsøkuborðið** kr. 250,-

**29. juli kl. 12.00 - 22.00**
Stóra **Ólavsøkuborðið** kr. 250,-

**30. juli kl. 12.00 - 22.00**
Ólavsøkumatskrá við 3 rættum kr. 225,-

*Børn undir 12 ár: kr. 100,-*

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant
Tel 31 75 00

ÓLAVSØKAN 2004



ØLLUM VERÐUR YNSKT EINA GÓÐA ÓLAVSØKU

STØKK INN Á GÓLVIÐ OG SÍGGJ OKKARA STÓRA ÚRVAL

Handilin á kajuni
í Hvalvík • Tel. 422 394

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR